DAGSINS MEINING

Verkamannadagur

Í dag er fyrsti mai, og hesin dagur er sum øllum kunnugt altjóða verkamannadagur. Um allan heim verður hesin dagur hildin við fundum, kravgongum og ymiskum tiltøkum alt eftir umstøðunum. Upprunaliga var fyrsti mai ásettur av altjóða verkamannarørslu til tess at minnast offrini fyri harðskapi myndugleikanna mótvegis verkamonnum. Tey seinastu stórthundrað árini hevur dagurin verður nýttur til at minna á krøv verkfólksins, at vísa samhaldsfesti og styrki.

Nógv er broytt síðan verkamannarørslan av álvara tók seg fram. Upprunaligu krøvini vóru átta tíma arbeiði, átta tíma frí og átta tíma hvíld. Í framkomna ídnaðarheiminum eru hesi krøv langt síðan rokkin. Nú eru tað onnur krøv og onnur mál, sum eru á dagsskrá hjá altjóða verkamannarørsluni, tó so at lønarkrøvini enn sum áður eru frammaliga í huganum. Men krøv um heilsugott arbeiðsumhvørvi, ávirkan, samhaldsfesti við Triðja heimin, javnstøða millum kvinnur og menn, eftirútbúgving og serstakliga eftirlønarmál eru nú ovast á dagsskrá hjá verkamannarørsluni í nútímanssamfelagnum.

Altjóða verkamannarørslan hevur eisini markerað seg við at sýna samhuga og samhaldsfesti við demokratisku kreftirnar í teimum portum av heiminum, har einaræði og harðræði valdar. Í mong ár vóru norðurlendsku verkamannarørslurnar á odda í stríðnum móti apartheid og rasismu. Innan altjóða verkafelagsskapin ILO eru hesar rørslur framvegis í fremstu rød, tá tað ræður um at tryggja gott arbeiðsumhvørvi og sjálvsøgd rættindi hjá verkafólki í Triðja heiminum. Samantikið kann tað staðfestast, at hóast nógv broyttar umstøður og eitt støðugt batnandi vælferðarsamfelag er enn sum áður tørvur á verkamannarørsluni. Eisini her í Føroyum hevur henda rørsla havt stóran týðning fyri samfelagsmenningina og fyri at bøta um livikorini hjá teimum, sum bert hava hendurnar at líta á. Soleiðis fer tað eisini at verða framyvir og fara vit her at ynskja føroysku verkamannarørsluni góða eydnu í virkseminum fyri bøttum lívskorum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Kvinnur og fjølmiðlar - ein viðmerking

Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur.
http://heima.olivant.fo/~eydgunn/

Á kvinnuráðstevnuni í farnu viku kom fram, at kvinnur eru ov seinar at úttala seg, tá ið tær vera kontaktaðar av fjølmiðlunum, tær skulu hugsa seg um og eru ofta bangnar fyri at traðka fram. Við skjótt 8 ára roundum í kommunalpolitikki eri eg komin til ta niðurstøðu, at nakað er um hetta, men hetta er so langt ífrá allur sannleikin.

Spurningurin er eisini um tað er nøkur ódygd at vera varin við hvørt, sjálvt um tað ikki dugir at vera í politikki og »goyma« seg fyri fjølmiðlunum.

Rætt er, at kvinnur vilja tryggja sær, at tað tær úttala seg um er skotsikkurt meðan menn tykjast raðfesta møguleikan at úttala seg framum málið sjálvt. Spurningurin er so, hvat er betur? Um ongin munur er á einum kvinnuligum og manligum politikarum, hvat er so vunnið? Kunnu vit so ikki tað sama bert hava menn í politikki? Havi onkuntíð hoyrt tað viðmerking um kvinnuligan politikara, at hon er sum ein kvinna í mannfólkaklæðum, og tað helt eg ikki ljóða positivt.

Tað, sum kvinnurørslan vildi í síni tíð var júst at fáa hugsanina hjá kvinnunum við í politikkin fyri at allar síður av einum máli skuldi vera lýst, og tí at ein helt, at kvinnur høvdu nakrar tankar og nøkur onnur virðir at koma við, ið kundu tryggja eina meira heildarkenda loysn á málunum. Um allir politikarar eru eins (les. Sum menn) so hevði eg persónliga ikki valt eina kvinnu, tí so hevði tað bert verið tí, at hon var kvinna og ikki útfrá hvat hon hevði av sjónarmiðum.

Tíðindaflutningurin í dag er bert merktur av einum og tað er evstamark. Tí er møguligt at tað hevur minni týðning um tú úttalar teg her og nú, uttan at seta teg nakað serligt inn í tað, ið tú skal úttala teg um, tí í morgin er søgan ein onnur, og tá hugsar ongin um, hvussu rætt tað var ið tú segði. Mín niðurstøða er, at mátin fjølmiðlarnir virka uppá ikki passar so væl til kvinnurnar, og at kvinnur mugu vera meira tilvitaðar um ikki at vera so varnar, sjálvt um eg framvegis ikki haldi ein skal leypa á leistum fyri at sleppa í fjølmiðlarnar.

Hinvegin haldi eg eisini, at fjølmiðlarnir kunnu taka nakað í egnan barm. Ein upplivir ikki so sjáldan, at mál har ein kvinna situr við ábyrgdini, er tað mennirnir, ið vera spurdir í fjølmiðlunum. Sjálv havi eg ongantíð enn upplivað at verið spurd um mál, sum eg ikki beinleiðis varði av. Vit koma ikki burtur frá, at mátin fjølmiðlarnir arbeiða uppá ikki sampakkar so væl við flestu kvinnum, men tað átti at borið til at lært av hvørjum øðrum, tí tað er ikki altíð at skjótast er best, og tað finnast nokk eisini dømi um, at tað hevði verið betur um ein søga bíðaði ein dag ella tveir.

Føroyingar skulu á altjóða pallin

Kaj Leo Johannesen
Sambandsflokkurin

Samskifti og samstarv millum tjóðir, felagsskapir, fyritøkur og einstaklingar eru lyklaorð í heiminum í dag, og føroyingar skulu í nóg størri mun enn higartil inn á altjóða pallin.

Ígjøgnum ríkisfelagsskapin hava Føroyar diplomatiskt samband við umleið 180 lond, og sendistovur í sløkum 70 londum. Harumframt er ríkið umboðað í stórum altjóða felagsskapum sum til dømis ST og ES.

Sambandsflokkurin hevur í Nýskipanaruppskotinum lagt upp til, at uttanríkismál skulu vera ríkismál, ið danska stjórnin formliga skal hava ábyrgdina av, men hetta eigur ikki at forða fyri, at føroyingar sjálvir vinna fram í uttanríkispolitiskum høpi. Tvørturímóti skulu vit nýta kunnleikan og drúgvu royndirnar, sum Danmark hevur á økinum til at vinna okkum fyrimunir.

Heimastýrislógin gevur føroyingum rætt til at seta umboð við sendistovurnar í teimum londum, har Føroyar hava serligan vinnuligan áhuga. Hetta skuldi verið ein góður møguleiki hjá føroyingum at mennast í einum góðum umhvørvi saman við fakfólki við drúgvum royndum.

Tað eigur at vera uppgávan hjá føroyingum at greiða umheiminum frá, hvørji vit eru, og hvat vit hava at bjóða. Føroyingar eru best førir fyri at røkja føroysk áhugamál í umheiminum, og í tøttum samstarvi við onnur gerst úrslitið uppaftur betri.

Vit eiga tí at seta okkum sum mál, at innan 5 ár skulu í minsta lagi 15 føroyskir ungdómar starvast við sendistovur ríkisins úti í heimi. Hesi skulu fáa upplæring og royndir í altjóða samstarvi, fyri at kunna bera hesa vitan heim aftur til føroyska samfelagið.

Hetta uppskotið kundi til dømis verið formaliserað í sambandi við at embætisverkið hjá ríkisstjórnini, saman við føroyskum og grønlendskum embætismonnum í hesum døgum fyrireika lógaruppskot, har við Føroyar og Grønland skulu hava viðkaðar uttanríkispolitiskar heimildir.

W W W . S O S I A L U R I N . F O

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

1. Mai

Nina Dahl

Da jeg flyttede til Torshavn for et par og tyve år siden, stod der ved Bacalao nogle skure og campingvogne. De kunne sikkert ikke leve op til de sundhedskrav, der stilles til en bolig - - men de havde den fordel, hvis man ellers kunne holde lugten fra egningarskurene ud, en husleje, der kunne betales af en arbejderløn.

I dag er de væk, erstattet af moderne boligbyggeri med lejligheder til enlige og par - - - sådan burde det have været. Skurene er væk. I stedet flyttede arbejderne ind på værelser og i kælderlejligheder hos private, og huslejepriserne steg endnu en gang.

Mange af os bruger en stor del af vores voksenliv på at bo til leje hos andre, mens vi sparer op til et grundstykke - - og siden et hus - - for så at bo til leje hos banken størsteparten af vores voksenliv og arbejdsliv.

Skal det være sådan? Eller er det på tide, arbejderbevægelsen går forrest og er med til at udforme en boligpolitik og boligbyggeri, der kan betales af en arbejderløn?

Den gang som nu kan du finde annoncer, hvor der står: Ungt fredeligt par, der hverken ryger eller drikker, uden børn, ønsker lejlighed – er det rimeligt?!

Det gode arbejdsliv, hvad er det? Det ville være rimeligt og ønskeligt, hvis der på Færøerne var en specialarbejderskole, og starten på et arbejdsliv begyndte med et introduktionskursus, arbejdsmiljø, personlig sikkerhed, forebyggelse af ensidigt gentaget arbejde – og derpå kursus til de enkelte grene af industrien og erhvervslivet. En skole, man kan vende tilbage til gennem et arbejdsliv med supplerende kurser. Det burde være en tværfaglig opgave for arbejdsgivere og fagforeninger. Det ville også være en fordel, hvis arbejdsløse kunne tage uddannelsesorlov mere end de seks uger, som der nu er åbnet op for i ALS, og dermed forøge chancerne for at komme i arbejde igen. Over skatten betaler vi til undervisning: folkeskolen, studenterskolen, handelsskolen, sygeplejeskolen, sømandsskolen, maskinmesterskolen, universitetet o.s.v.

Da vi kom til håndværkerne, var der lidt – da vi kom til arbejderne, var der ingenting!

Arbejdspladsen

Er arbejdstiden lagt til rette, så man kan nå at aflevere børn i institutioner, vuggestuer, børnehaver og fritidsordninger og hente dem igen? Og ved børns sygdom, hvad så? Huslejen og faste udgifter bliver ikke mindre, fordi man er hjemme hos syge børn – børn ingen hindring!

Ensidigt gentaget arbejde, er man opmærksom på det? Hvad koster det den enkelte? Hvad koster det arbejdsgiveren? Hvad koster det samfundet? Samarbejder ledelsen, tillidsrepræsentanter og sikkerhedsrepræsentanter? Gør arbejspladsen nok for at få valgt tillids- og sikkerhedsrepræsentanter? Gør arbejderbevægelsen? Er der gode kantineforhold? Kan man eventuelt købe et måltid mad til en pris, der samsvarer en arbejderløn? Bliver der taget hensyn til ældre medarbejdere, er der plads til handicappede? Gør man noget for at få det rart sammen efter arbejdstid? – Listen er lang. Vi opholder os på arbejdspladsen en stor det af vores liv. Forløse! – For en familie, hvor den ene eller begge bliver arbejdsløse, er det en katastrofe. 70 % af en arbejderløn, hvordan skulle man kunne betale afdrag på hus, faste afdrag, købe mad? Man kan eksistere, ikke mere. Kravet til ALS må være, at den minimum kommer op på 90% af en arbejderløn. Virker fiskidagaskipanin? Hvordan kan to med samme indtægt få forskellig udbetaling? Er Als i større eller mindre grad endt som et sted for nedslidt arbejdskraft, især kvindelig, der mere hører under almannastovuni end ALS. ALS ejes af parterne på arbejdsmarkedet. Den løser opgaver, som burde være samfundsopgaver, lige så vel som det er en samfundsopgave at sørge for, at vi får en folkepension, vi kan leve af ved slutningen af arbejdslivet. Det skal ikke være fagforeningens opgave. Hvis de velbjærgede så vil spare op ved siden af, er det en privat sag, de har råd til det.

Det absolut mest positive, der er sket på arbejdsmarkedet i mange år, er lov om barsilsskipanina. Ret til fuld løn 4 uger før og i særlige tilfælde optil 13 uger, ret til 24 uger med fuld løn efter fødsel, fædres ret til barselsorlov med løn - - men det blev altså for meget, og der skal lægges loft på, så højeste udbetaling er 20.000, og tiden skal kortes ned. I bemærkningerne til loven står der dog klart og tydeligt: "Ásetingin ger ikki inntriv í a_ra lóggávu ella sáttmálar, sum tryggja løntakarum rætt til løn ella endurgjald í sambandi vi_ barsilsfarloyvi". Altså, hvem blev Askepot.

Ufaglært arbejdskraft udgør ca. 7000 mennesker, deraf ca. 4000 fuldtidsjobs, Når vi så samtidig medregner den gruppe af børn og unge, som vi er forældre til, er vi den langt største gruppe i samfundet. Men hvordan er vi repræsenteret i lagting og landstyre? Er vi stort set andet end stemmekvæg?

1. mai 2oo4

Máttmikla stríðssól

Ljómandi stríðssólin skæra
samhaldsføst sýnir sín mátt
árvakin vil okkum læra
stríðsfús alra daga og nátt

sum soppar í køstagarði
spekulantarnir vála um vøll
Proletaranna stríðsfúsi skari
Stríðsfylking ljómandi snjøll

ríkmansins løður á tremur
á sjógvi og landi eitt kraddaralið
ágang mót proletarunum fremur
margbøðlar geva ongum grið

tænaralið fólksins til harrafólk vorðið
grammleikans margbøðlar dusa sær
tær bløðandi hendur vælferðina borið
ránsmannaliðið hástóra lær

alneyðugt stættarstríð-stríðssól vil skína!
privatkapitalisman so karrotin er
gullbarónaliðið brátt vil dvína
kapitalisturin kúgan og neyð í skjøldri ber

av ræðslu við bløðandi hondum
Proletarar um verøld vítt
leinkjaðir vóru við trælabondum
Kollvelting! Fólkið tá frælst og frítt!

eitrandi,kúgandi tjóvsvætti víða
hjartað av dramblæti fylt
mót oyðandi kreftum socialisman vil stríða
droyrreyða stríðsmerkið geisandi gylt

stríðssólin brimandi logar
arbeiðarafjøldin mergjað og sterk
Solidariska rósan boðar
vælferðin er tykkara verk

altjóða proletarar, sjónarringur víði
móti órætti,hungri og neyð
í blánanum reyðhanin blíði
saman at standa okkum tað beyð !

Proletarar! Kollvelting í eygsjón
tann kúgandi stættin mønusting fá
samanhald,brøðralag, styrki og vón
Stríðsmerkið reyða í húnar há!

í eystri tann blóðreyði roði
ein fylking sum bjartasta ljós
tann solidariska skaran eg skoði
Kammerátar! Vit eru á rættari kós

prúða solidariska landi at hóma
Proletarskarin frælsur á ferð
lat javnrættarkvæðið ljóma
Socialisman mót hæddum meg ber

Sólmundur Joensen
2004



Einaferð enn. Hvat er eitt spælistað?

Heðin Ziska Davidsen
MenTón

Jú jú. Gleðiligt er, at breið semja var á tingi um spælistað kring landið.

Tað frøir meg. Men hvat meina fólk við, tá tey siga spælistað.

Eg las í Sosialinum eina viðmerking hjá John Johannesen, har millum annað verður sagt: »... at ungu og evnaríku tónleikararnir fáa spælistað at venja í á ymisku plássunum...«

Tit mugu orsaka, um eg virki grenjutur ella so, men tað eg eri eftir, at hann sigur:

»...at venja í...«

Tá eg og aðrir tónleikarir tosa um spælistað, so meina vit við eitt stað at framføra tónleik, t. v. s. konserthús. Eitt stað at venja í, rópa vit venjingarhøli. Eg vil bara vera vísur í, hvat menninir meina við, ella um teir vita, hvat teir tosa um. Konserthús ella venjingarhøli. Tað er stórur tørvur á báðum, men tað er ikki eitt og sama ting.

Vildi bara vita, hvat eg skuldi gleða meg til. Venjingarhøli ella konserthús. Ella bæði, kanska?

Fólkafundur á Doktaragrund

Í dag kl. 17.00 skipar Tjóðveldisflokkurin fyri almennum fólkafundi á doktaragrund.

Á skránni verða røður, felagssangur og tónleikur.

Birgir Nónsgjógv ferð at standa fyri tónleikinum og felagssanginum.

Røðarar á fundinum vera:
Annlis Bjarkhamar, lærari
Vígdis Johannesen, fakfelagsforkvinna
Marianna Debes Dahl, rithøvundur
Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður

Eftirfólkafundin verður tjóðveldiskafé, har upplestur verður.